# 3100 kr. til hungursrakt børn

**Hóast stutt er fráliðið, so er líkt til at fólk taka undir við Reyða Krossi og innsavning teirra fyri hungursrakt børn í Afrika**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*



*Henda mamma og barn hennara eiga ikki nógv, men peningurin úr Føroyum kann gera stóran mun fyri framtíðina hjá teimum báðum*

»Allur bati bøtir«.

Soleiðis kann ein eisini siga um innsavningina hjá Reyða Krossi Føroya í sambandi við hungursneyðina í afrikanska landinum Niger. Innsavningin byrjaði beint eftir ólavsøku, og longu nú eru tær fyrstu 3100 kr. komnar inn á konto'ir hjá felagsskapinum, upplýsir Súni Vinther, formaður í Reyða Krossi.

Hóast onkur kann halda, at hetta ikki er so stór upphædd í okkara heimi, so kann tað, sum hesin peningur kann geva, verða ein spurningur um lív ella deyða fyri mong menniskju.

Felagsskapurin sendir sjálvur 50.000 kr. til hetta neyðhjálpararbeiðið, og vónar, at aðrar 50.000 kr. kunnu verða savnaðar inn kring landið.

Hetta verður gjørt við serstøkum bússum, sum eru settar runt ymsastaðni í landinum, eins og møguleiki er at flyta peningin inn á konto'ir hjá Reyða Krossi í peningastovnunum.


# Tórshavnar kommuna

## ynskir tykkum

## eina góða og grøna ovastevnu

### Skráin, fríggjadagin 6. august

16-17:00 Barnabakikapping - Lat køkuna inn í Avhaldshúsið.Vinnarin verður kunngjørdur í smb. v/ setanina.
16-17:00 Lundafleyg uttanfyri Avhaldshúsið
18-21:00 Tiltøk í skúlagarðinum: Diana Victoria verður sýnd fram, karrusel, skreiðiborg, hoppiborg, asni, el-bilar til børn 2-8 ár
18-22:00 Tivoli letur upp úti á Veg: tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, 21-spæl, ballónir
19-23:00 Breyðsøla í Kaffistovuni.
19-22:00 Brotssparkskapping á keiini
19-22:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsveggi.
19-23:00 Pylsuvognurin er úti á Veg
20:00 Kabarettin "Eitt skot í mjørka" í Royndarhúsinum (atgongumerki á 75kr, tlf. 580273)
00:00 SHOWMENN spæla til dans í tjaldinum úti á Klivum
00-04:00 Pylsuvognurin er opin úti á Klivum

### Skráin, leygardagin 7. august

10:00 Svimjararnir fara á bláman úti við Strond í Havn
14:00 Stevnan verður sett í Geilini: Heðin Mortensen, borgarstjóri, heldur røðu. Nólsoyar sangkór syngur og heiðursmerki verða handað.
15:00 Bilframsýning: Model-monstertruck vísa kynstur úti á Klivum.
15:00 Reyði Krossur kunnar um virksemið í Føroyum á keiini til kl. 20.
19-23:00 Breyðsøla í Kaffistovuni.
15-24:00 Matsøla í tjaldinum á keiøkinum
15:00 uml. kl. 15 koma regattasiglararnir til Nólsoyar.
15-24:00 Tivoli letur upp úti á Veg: tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, 21-spæl, ballónir 18-21:00
15-21:00 Tiltøk í skúlagarðinum: Diana Victoria verður sýnd fram, karrusel, skreiðiborg, hoppiborg, asni, el-bilar til børn 2-8 á.
15:00 Brotssparkskapping á keiini.
15-24:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsveggi.
15-23:00 Pylsuvognurin er úti á Veg
16:00 Skattaveiða fyri børn og barnsligar sálir úti á Veg.
16-21:00 Smábátar í hyli úti á Veg.
16-19:00 Loppumarknaður í Avhaldshúsinum
16:00 Kabarettin "Eitt skot í mjørka"
18:00 Kabarettin "Eitt skot í mjørka"
22:00 Felagssangur undir Mikkjalsveggi. Fýrverk eftir sangin! Sanghefti eru til keyps í Stevnukioskini og á Kaffistovuni.
00:00 SHOWMENN spæla til dans í tjaldinum úti á Klivum
00-04:00 Pylsuvognurin er opin úti á Klivum.

### Skráin, sunnudagin 8. august

12:00 Guðstænasta v/ Bjarna Bæk, dómpróvsti
15:00 Tivoli letur upp úti á Veg. Tombola, fiskibrunnur, bamsutombola, 21-spæl, og ballónir (opið er til kl. 20)
15:00 Smábátar í hyli úti á Veg. (Opið er til kl. 18)
15:00 Pylsuvognurin letur upp úti á Veg (til kl. 20)
15:00 Brotssparkskapping á keiini um bóltar eru eftir.
15:00 Matsøla í tjaldinum á keiini Breyð, turrur fiskur, spik og epli (til kl. 20)
15:00 El-bilar til børn 2-8 ár, í skúlagarðinum til kl. 18
15:00 Í skúlagarðinum er karrusel, skreiðiborg, hoppiborgin og asni. (Tiltøkini eru opin til kl. 18)
15:00 Diana Victoria verður sýnd fram í skúlagarðinum.
15:00 Stevnukioskin letur upp undir Mikkjalsveggi. (Kioskin er opin til kl. 20)
15:00 Breyðsøla í Kaffistovuni (opið er til kl. 23)
16:00 Loppumarknaður í Avhaldshúsinum (Opið er til kl. 19)
18:00 Kabarettin "Eitt skot í mjørka" í Royndarhúsinum

### Skráin, mánadagin 9. august

20:00 Kabarettin "Eitt skot í mjørka" í Royndarhúsinum

## Farið væl um umhvørvið, koyrið fløskurnar í fløskubingjunar